## DAGSINS MEINING

# Samgonguslit á ólavsøku?

Mangt bendir á, at hesi samgongu verður ikki langt lív lagað. Skulu vit gita, at løgmaður í síni ólavsøkurøðu fer at siga Føroya fólki frá, at hann leggur frá sær ella fer at taka aðrar flokkur uppí samgonguna – ella fer hann at gera tað longu týsdagin komandi?

Hetta eru tíðir við gitingum og illgitingum. Tíanverri. Nógv, sum verður skrivað og sagt, eru viðurskifti, sum standa í hálvum gekki. Hetta er ein ótolandi støða fyri fólk og kemur hon so eisini til sjóndar í tí veljarakanning, ið verður kunngjørd í Fregnum í gjár, har Sambandsflokkurin heldur fram at vaksa. Hetta er eisini eitt sjáldsamt fyribrigdi í føroyskum politikki: at ein flokkur við einum formanni, ið lítið og einki hevur gjørt um seg í fleiri ár, vinnur tokka veljarans. Tað kann so bert skyldast, at óttin og ivin, sum undanfarna samgonga, og her serstakliga Tjóðveldisflokkurin hevur sátt, og nú tann hatursfulli stemningur, ið er millum Fólkaflokkin og Tjóðveldisflokkin, gagnar polariseringini te. í hesum førinum Sambandsflokkinum. Javnaðarflokkurin, sum hevur valt ta torføru uppgávu at reka konsensuspolitikk og byggja brýr tvørtur um miðjuna, tykist framhaldandi at hava ringt við at fáa betri fótafesti. Tað løgna er eisini nú, at formaðurin í Tjóðveldisflokkinum sýnist royna at finna gomlu hugsjónirnar framaftur og ikki bara gera føroyskan politikk til eina tí einastu hugsjón, nevniliga fullveldi. Tað átti at verið eitt áhugavert signal til Javnaðarflokkin.

Komandi dagar fara at avdúka, hvør fer at stýra eftir ólavsøku. Tað er útilokað, at henda samgongan kann halda fram óbroytt. Tað er tað einasta, ið løgmaður í skrivandi løtu má og eigur at vera 100% greiður yvir. Og út frá hesi sannroynd má hann handla. Hvørki við ella uttan einum sakarmáli kann ADEH samgongan halda fram. Valmøguleikarnir hjá løgmanni minka, nú Tórbjørn Jacobsen velur at koyra meira lóður í kanónina. Í Fregnum verður málið gjørt til eina uppgerð við ætlaninar hjá Fólkaflokkinum at leggja inn undir seg almennu vinnulívsognirnar. Er hetta beint má øll tann politiska skipanin vera á varðhaldi. Almennar ognir skulu ikki gjarast út bíliga og lætt til ávísar útpeikaðar persónar við tí rætta politiska tilknýtinum. Men tað er uppgávan at vera á varðhaldi alla staðni. Maðurin, sum setur skuldsetingar og gitingar fram, er ikki júst kendur fyri at vera Guds besta barn, hyggja vit eftir hansara “fortíð”. Vit minnast, hvussu hann fyrst hongdi løgmann út at vera danskan leigusvein, fyri síðani av avnokta tað og fyri síðani aftur at verða avdúkaður sum lygnari, tá bandað samrøða varð almannakunngjørd.

Er hald í skuldsetingunum móti løgmanni, so skulu tær fram og kannast. Ætla útvaldir fólkafloksmenn at leggja seg á almennar ognir, má tað steðgast. Ætla Tórbjørn Jacobsen og hansara vinnulívsmenn at gera tað, má tað eisini steðgast. Hvørja trygd hava vit fyri, at kampurin í Tinganesi ikki er eitt stríð millum fólkafloksmenn og tjóðveldismenn at leggja til hjá sær og sínum!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Var hetta betur ósagt?

**Signar P. Heinesen**



Torbjørn Jacobsen hevur enn einaferð sett dagsskránna á politiska leikpallinum. Hesuferð segði hann tað, sum flestu okkara vildu kustað undir vaðingina. Fleiri hava tikið orðið, men bert Torbjørn hevur sagt Orðið. Øll hini glíða av við vendingini "um tað er so..."

Millum manna ljóðar tað ørkymlaða: "Hetta var helst betur ósagt" — Men hvat nú?

**Ein spurningur um mentan og virði**

Við nýggju stýrisskipanini hava vit skift eina politiska mentan við aðra. Løgmaður og landsstýrismenn hava nú so stórt vald, at teir í praksis eru einavaldsharrar á sínum øki í flestu almennu málum og harvið í stórum parti av praktiska lívinum hjá teim flestu.

Á herðum løgmans og landsstýrismanna hvílir okkara felags mentan og felags virði. Teirra atferð er veljarans atferð og teirra virði eru veljarans virði.

Meðan politikarar og embætisverk tykjast hava tikið nýggju stýrisskipanina til sín uppá ein heilt serligan máta og hava við orðum Heðins Brú skift mentan, sum vit skifta stúku, so hevur vanligi veljarin neyvan givið sær far um broytingina.

Eldra tingmentan okkara var felagsskapur, opinleiki og tøgn um ymsu veikleikarnar hjá tí einstaka.

Samanborið við politikarar í øðrum londum hevur føroyski politikarin fingið rættiliga stórt frælsi at liva sítt privata lív leyst frá tí politiska lívinum. Tøgnin kávaði útyvir veikleikarnar, sum oftast vóru at liva við hjá øllum. Tað var verri at siga, at annar segði ósatt enn at siga ósatt og tað var verri at siga, at annar tekur enn at taka.

Virdu politikarar og embætisverk hendan siðaarv, so bar væl til at fáa gagn av nýggju stýrisskipanini.

Men við verandi kós beri eg ótta fyri, at eisini veljarin má seta sær fyri at broyta mentan sína.

**"De magtesløses magt" — Vaclav Havel 1978**

"Hvis "livet i løgn" er systemets grundlæggende støtte, kan det ikke undre, at "livet i sandhed" bliver den grundlæggende trussel mod det. Derfor må systemet forfølge det hårdere end noget som helst andet."

Spurningurin um, hvørt vit kunnu liva við veikleikunum hjá tí einstaka — eisini í landsins hægstu útinnandi valdsembætum — kann svarast óbeinleiðis ígjøgnum hendan logiska setningin hjá Havel.

Um so er, at "livet i sandhed" verður atsøkt frá hægsta stað, tí ósannindi og ósonn atferð fyllir so nógv í valdsskápunum, so er tíðin búgvin at bróta tøgnina, hóast talan pínir.

**Maktlæran ella leiðslulæran**

Tað ber eisini til at finna ýti at meta um "livet i sandhed" verður atsøkt.

Í høvuðsheitum eru tvey sett av amboðum til at stýra við. Annað settið ber heitið "maktlæran", sum er eitt høvuðsevni í tí partinum av samfelagsvísindini, sum tekst við statsvísindi — politologi.

Hitt settið av amboðum ber heitið "leiðslulæran", sum er væl nýggjari læra og sum hevur høvuðssæti á lærdum skúlum innan leiðslu og organisatión.

Hesir báðir amboðskassarnir eru so ymiskir, at tað snøgt sagt ikki ber til at virka við báðum samstundis. Teir útiloka hvønn annan. Har leiðslulæran hevur til endamáls at fremja felags mál í felag hevur maktlæran til endamáls at fremja egin áhugamál við annara hjálp.

Leiðslulæran verður drivin við felags vilja til gott verk og felags tilfeingi. Felagsskapurin er kjarnin. Maktlæran verður drivin við egináhugamálum. Rásarúmið, sum maktlæran byggir á, er at rættarskipanin, umboðsmaður løgtingsins, fjølmiðlarnir, tann einstaki kritikaranin og aðrar eftirlitsskipanir hava avmarkaða orku, avmarkað innlit og avmarkaðar møguleikar.

Har leiðslulæran ikki kann liva við ósannindum og ósannari atferð ber als ikki til at útinna maktlæruna í verki uttan ósannindi og ósanna atferð.

Ella sagt øðrvísi: Maktlæran má í síni útinning vísa til "livet i løgn", meðan leiðslulæran ikki kann annað enn vísa til "livet i sandhed".

Í tí sambandi er tað umhugsanarvert, at formaður Tjóðveldisfloksins og ráðgevar hansara brúka tríggjar dagar at leita í ymiskum amboðskassum til tess at seta seg føran fyri at svara alment uppá spurningin, hvat flokkurin sigur til tað, sum Torbjørn hevur skrivað. Eftir hesar tríggjar dagarnar tekur hann fram eitt av amboðunum hjá maktlæruni og roynir at gera málið til eitt persónsmál — t.e. at skúgva málið sjálvt av dagsskránni.

Eg ivist ikki í, at varð leitað í amboðskassanum hjá leiðslulæruni, so var svarið nakað øðrvísi — og helst væl lættari hjá okkum øðrum at skilja.

**Orðið er sagt — hvat so?**

Sjálvur meti eg, at vit eru í einum mentanarligum aldudali, har ósannindi og ósonn atferð kemur alt ov ofta fyri, har slíkt helst ikki skuldi komið fyri og als ikki tilætlað.

Korini hjá "livet i sandhed", munnu vera so ymisk á teim ymsu málsøkjunum. Ringast man vera statt undir honum, sum alment hevur sagt beinleiðis ósatt tvær ferðir, tað eg veit um. Fylgjurnar eru eyðsýndar bæði fyri úrslitini og fyri tey, sum dagliga starvast — og eitt sindur øðrvísi fyri tey, sum ikki fáa loyvi at útinna sítt dagliga yrki — innan tey málsøki, viðkomandi hevur ábyrgd av.

Allir politikarar kenna til hesi viðurskifti og eingin umbering er fyri ikki at gera nakað við tað. Serliga ábyrgd hava samgongupolitikarar og nú orðið er sagt, eru bert tvinnar leiðir: Antin søkka vit djúpari í "livet i løgn", ella vilja tey fólkavaldu brúka sítt mandat frá veljaranum til frama fyri "livet i sandhed". Millumvegur er eingin.

Nú orðið er sagt, verður veljarin settur í eina valstøðu, tí gera tey fólkavaldu einki við uppgávuna, so er ábyrgdin veljarans til næsta val: hvørji virði og hvørja mentan vil eg sum veljari lata mína atkvøðu brúka til.

Á herðum veljarans hvílir ábyrgdin at velja virðilig umboð á Ting, sum í verki útinna felags virði og mentan okkara og sum forða tí, sum vit ikki ynskja skal vera partur av okkara felags mentan.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Rúnar Reistrup runar@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Ragnhild Ellingsgaard ragnhild@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Páll H. Johannesen pall@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Finnur Justinussen finnur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Rullandi redaktíonin:**
tel. 220507 tel. 333843
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Tilfeingi – tilfeingisrenta

**Sjúrður Guðjónsson**
*Tórshavn, 17. juli 2002*

Framtíðar "vinstra — høgra politikkur" fer uttan iva at snúgva seg um tilfeingi og ikki minst um tilfeingisrentu. Tí hevur tað stóran týdning, at vit fyrireika okkum til hesa avbjóðing. Fyrst og fremst við at útgreina tilfeingisspurningin, og ikki minst at finna útav hvat tilfeingi er ogn Føroya Fólks (Tjóðarogn), og hvussu tað skal umsitast.

Í valstríðnum, í vár, nam okkurt valevni við spurningin um tilfeingi og tilfeingisrentu. Onkrar einstakar greinar hava eisini verið í føroysku bløðunum seinasta árið um evnið, umframt, at Búskaparráðið, formaðurin og skrivarin í ráðnum, sera skilagott hava viðgjørt evnið.

Meti at júst hetta evnið í framtíðini fer at merkja føroyskan "vinstra — høgra politikk".

Á vælferðarøkinum eru allir flokkar so gott sum samdir, men tá tað snýr seg um tilfeingi og tá serliga tilfeingisrentu er allarhelst langt ímillum flokkarnar. Ein lítil viðmerking frá Jóannesi Eidesgaard um ein almennan fiskidagabanka, fekk løgmann at reisa uggafjarðarnar í sendingini, sunnukvøldið fyri valið. Her kom týðiliga til sjóndar at javnaðarflokk-urin og fólkaflokkurin ikki drógu somu línu.

Í stevnumiðum Javnaðarflokksins verður nomið við ein almennan fiskidagabanka. Hetta skal helst skiljast á tann hátt, at flokkurin tekur undir við at tilfeingisrentan í fiskivinnuni, skal koma almenn-inginum tilgóðar. Tjóðveldisflokkurin hevur líknandi orðing í sínum stevnumiðum, umframt at tjóðveldisflokkurin slær fæst, at alt náttúrutilfeingi er ogn Føroya Fólks, og skal hetta staðfestast í Grundlógini.

Miðflokkurin sigur í sínari skrá at fiskatilfeingi er ogn Føroya Fólks. Tað sær ikki út til at Miðflokkurin hevur tikið støðu til rentuna.

Sjálvstýrisflokkurin sigur, at alt tilfeingi á landi sjógvi og undirgrund er ogn Føroya Fólks, men heldur ikki her verður nakað nevnt um tilfeingisrentuna.

Sostatt sær út til at javnaðarflokkurin og tjóðveldisflokkurin í spurninginum um fiskatilfeingisrentu eru nøkulunda samdir, meðan fólkaflokksmanningin helst hevur eina aðra meining, sum viðmerkingin frá Anfinni Kallsberg bar boð um, hóast stevnuskrá Fólkafloksins ikki nevnir nakað itøkuligt hesum viðvíkjandi.

Hesir tríggir flokkarnir eru helst teir, sum hava tær mest avgjørdu meiningarnar um evnið.

Sambandsflokkurin ger í sínum stevnumiðum ikki so nógv burtúr hesum evni.

Samanumtikið sær ikki út til at tilfeingisspurningurin hevur stóra rúmd í stevnumiðunum hjá føroysku politisku flokkunum.

Teir flokkar, sum nevna evnið í stevnuskráðunum, nema at kalla bert við fiskatilfeingi.

Men hvat snýr hetta so seg um? Hvat er tilfeingi og hvat er tilfeingisrenta?

Tilfeingi er tað sama, sum danir og normenn rópa fyri "ressourcer", og verður hetta oftast brúkt um fiskastovnar og um oljuna í undirgrundini. Eisini er vanligt at júst fiskur og olja verða býtt upp í tilfeingi, sum verður endurnýggja (fiskur) og tilfeingi, sum ikki verður endurnýggja (olja). Felags fyri fisk og olju er at bæði kunna troytast við búskaparligum vinningi

Fiskastovnarnir og oljan eru sum sagt tilfeingi, sum bæði hava stóran búskaparligan týdning, men harafturat hava vit nógv annað tilfeingi, sum hava ella møguliga fara at fáa stóran búskaparligan týdning, nevnast kann m. a.:

Alifirðirnir.
Vatn, m.a. til orku.
Streymur og alda.
Vindur.
Luftin, eisini radiobylgjur til fartelefonir o. a..
Fólkið, sum her býr.
Jørðin, dyrka sum ódyrka.
Fuglur og annað livandi.
Arva(gen)-tilfeingi!?
o.s.v.

Soleiðis kann haldast fram við at nevna ymiskt, sum meira ella minni fevnur um hugtakið tilfeingi. Tað, sum hevur størstan almennan áhuga er, um viðkomandi tilfeingi gevur búskaparligt avkast til tann, sum eigur (tilfeingisrentu).

Tí er OGNARRÆTTURIN avgerandi í tilfeingisspurninginum.

Er tað ogn Føroya Fólks (Tjóðarogn) ella er tað privat ogn (einstaklingar og feløg)?

Er tilfeingi á privatum hondum t.d eitt jarðarstykkið, er sjálvandi ongin ivi um hvør fær rentuna ella avkastið. Eigur ein privatur pengar á bók er heldur eingin ivi um hvør fær rentuna. Sjálvandi hann, sum hevur ognarrættin til bókina.

Er tilfeingi hinvegin Tjóðarogn, er støðan ein onnur. Løgtingið hevur sjálvandi ongan møguleika fyri at fara til skips ella at ala laks, útvinna olju ella at røkja jørðina.

Tí er neyðugt at Løgtingið, ígjøgnum Landsstýrið, letur øðrum brúksrættin til tað tilfeingi, sum er Tjóðarogn, og sum gevur búskaparligt avkast.

Tilfeingisrentan verður tá tann leiga, renta ella prísur, sum Landsstýrið fær fyri nýtslurættin.

Hetta kann m.a. gerast við at bjóða viðkomandi tilfeingi út í fríari kapping, eins og Búskaparráðið mælir til í samband við brúksrættin til fiskatilfeingi.

Aðrir mátar finnast eisini, eitt nú avgjaldsskipanir, sum eru tengdar at framleiðsluni, ella loyvisgjøld. Eitt nú hava teir føroysku festibóndirnir í nógv ár goldið eitt ávíst gjald til jarðarráðið sum leiga fyri landsjørðina. Tey seinni árini hevur henda leiga tó bert havt symbolskan týdning. Fyrr í tíðini var leigan tó ein stórur kostnaður fyri garðin.

Í okkara oljulóggávu er eisini heimild fyri at ásett verður ein tilfeingisrenta. Tey oljufeløg, sum higartil hava fingið leitingarloyvi skulu, um tey fara at framleiða olju, gjalda 2% av bruttoframleiðsluvirðinum í framleiðalugjaldi. Her verður tilfeingisrentan nevnd "royalty".

Óivað eru eisini onnur dømir um almenna áseting av tilfeingisrentu. Hetta merkir, at í roynd og veru er hetta nakað, sum ikki er heilt ókent fyri okkum.

Í privatu vinnuni er hugtakið tilfeingisrenta væl kent. Her hjá okkum kenna vit jú væl til at fiskidagar, kvotur og fiskiloyvir verða handlaði. Og ikki minst haruhagarnir, sum er eitt gott dømi um sølu av tilfeingi á fría marknaðinum. Lagt kann vera tilmerkis at tað er brúksrætturin, og ikki ognarrætturin, sum verður handlaður fyri eitt ávíst tíðarskeið.

Tað er heilt greitt, at tá ávís fólk ella feløg fáa brúksrætt yvir onkrum avmarkaðum almennum tilfeingi, so skerjir tað møguleikan hjá øðrum at fáa lut í rættindunum. Tvs. at vit lata nøkur fáa ein framíhjá rætt, sum ikki øll kunnu fáa. Tað er tí ikki so løgið, at hann/hon, sum fær hendan rættin frammum onnur, rindar fyri hann.

Tá tað snýr seg um brúksrættin av almennum tilfeingi (Tjóðarognini), er neyðugt, at vit í framtíðini finna ein leist, sum Føroya Fólk kann taka undir við. Skal brúksrætturin til alt tilfeingi, ella partar av tí, bjóðast út í fríari kapping, skulu vit áleggja avgjøld, ella skulu vit kanska finna eina heilt aðra skipan?

Íslendska Altingið setti fyri nøkrum árum síðani ein bólk, sum skuldi koma við eini tilráðing um tað íslendska tilfeingi.

Bólkurin lat í 2000 eitt álit úr hondum. Sjálvt um niðurstøðan í álitinum varð nakað tannleys, við tað at onkrir limir í bólkinum ikki kundu taka undir við øllum, er nógv áhugavert og forvitnisligt í hesum áliti.

Hóskandi hevði tí verið, at vit føroyingar eisini fóru í holt við eina tílíka verkætlan, sum so kundi verið grundarlagið undir einum framtíðar føroyskum tilfeingispolitikki.

Helst skuldi ein tílík verkætlan lagt upp til at Løgtingið fekk møguleika fyri støðutakan til eina yvirskipaða tilfeingislóggávu.

Ein tílík lóggáva kundi m.a. eisini enda við, at vit ístaðin fyri fiskivinnumála-, vinnumála-, og oljumálaráð, fingu eitt tilfeingismálaráð, sum so umsat alt okkara tilfeingi.

# Ein takkarkvøða úr Onglandi

**Niðanfyri er prentað ein takkarkvøða frá einum onglendingi, sum fyri stuttum var á vitjan í Føroyum. Her vitjaði hann fólk, sum pápi hansara hevði samband við í krígsárunum**

**FØROYAVITJAN**
*Ragnhild Ellingsgaard*

Fyri stuttum prentaði Sosialurin eina grein, har ein maður úr Onglandi eftirlýsti føroyingum, sum høvdu havt samband við pápa hansara í krígsárunum.

Pápi hansara var staddur í Føroyum í hernaðarørindum, og sonurin vildi fegin fáa eitt slag av sambandi í lag við tey fólk, sum á ein ella annan hátt høvdu havt samband við pápan.

Serliga eftirlýsti hann eina familju í Eysturoynni, har pápin í síni tíð hevði knýtt vinarbond.

Fáar tímar eftir, at greinin hevði staðið í Sosialinum, fekk maðurin sendani teldupostar frá Føroyum. Hetta var alt frá eftirkomarum av familjuni í Eysturoynni.

Fyri stuttum var maðurin á vitjan í Føroyum, har hann í størri mun kom at kenna hesi fólk, sum høvdu staðið pápa hansara so nær.

Niðanfyri hevur hann skrivað eina takkarkvøðu, serliga ætlað teimum, sum gjørdu ferð hansara í Føroyum so minningarríka:

"Tað hevði glett meg stórliga, um Sosialurin kundi prentað hesa takkarkvøðu til teirra, sum gjørdu mína Føroyavitjan so minningarríka.

Tað byrjaði alt, tá eg sendi Sosialinum kunning um faðir mín Joseph McDine, sum tænti undir "the Royal Artillery" í Føroyum árini 1942 og 1943.

Eg leitaði eftir fólki, sum høvdu samband við pápa mín um tað tíðarmundið - serliga Mikkelsen familjuni úr Eysturoy.

Greinin varð prentað i Sosialinum, og nakrar fáar tímar eftir tók eg ímóti telduposti, sendur frá eftirkomarum av Mikkelsen familjuni.

Tá eg so vitjaði Føroyar seinasta vikuskiftið, komu tey øll og tóku ímóti mær.

At vitja gomlu vinirnar hjá pápa mínum og at síggja tey støð, sum hann kom at kenna so væl á Toftum og Nesi, var sera rørandi.

Fyri meg var tað harumframt nakað heilt serligt at hitta Mikkelsen-genturnar, Poulinu Zachariassen, Simonu Nielsen og Herthu Skylindal. Eitt sindur eldri nú, men enn líka blíðar sum í myndabókini hjá pápa mínum.

Kunningin, sum Jógvan Olsen gav mær um krígstíðina á Toftum og Nesi, var sera áhugaverd, og eg takki honum stórliga – eisini kvinnunum, sum syrgdu fyri teim undurfullu leskidrykkjunum.

At syngja "Abide With Me" og teir føroysku sálmarnar við vinunum hjá Jósefi var sera kensluborið fyri meg – ógloymandi.



*David McDine saman við nøkrum av vinfólki hansara í Føroyum*

Eg havi loyvt mær, við hjálp av mínum sambandi við fólk innan Bretska Hervaldið, at fingið til vega nakrar framsýningarlutir til forminnasavnið á Nesi.

Eisini ætli eg framvegis at hava samband við teir nýggju vinir, ið eg havi funnið. Og eg komi aftur næsta ár !

David McDine, Mount Ephraim, Wheelbarrow Town, Stelling Minnis, Canterbury, Kent, England CT4 6AH.

Teldupostur: david@mcdine.fsnet.co.uk